

# SheFa: Føroyska pulsæðrin út í



SheFa-kaðalin fer eisini at gagna oljuvinnu á Atlantsmótinum

**SheFa-2 er tann nýggi samskiftiskaðalin, sum gongur úr Foroyum umvegis Hetland og Orkney oyggjarnar til Skotlands. - Sum nú sar út eru vit framtíðartryggjað eini 10 ár fram við støðugum internetsambandi, sigur Páll H. Vesturbú, stjóri í SheFa, sum er dóttirfelag hjá Foroya Tele**

SAMSKIFTI
*Hilmar Simonsen*
*Myndir: Føroya Tele*

Fyrst var tað Cantat, sum foroyingar settu sítt álit, tá tað kom til internetsamskifti út í heim. Cantat kaðalin, sum stavar frá 1994, røkkur frá Kanada umvegis Ísland, Føroyar, og Danmark inn á týska meginlandið. Men tað finnast valla orð fyri, hvussu nógv krøvini til internetsamskifti eru herd síðani 1994.

- Cantat er um at vera útfasaður, kapasiteturin er ikki nøktandi longur, sigur Kristian Davidsen, stjóri í Føroya Tele.

## Føroyskur kaðal

Føroya Tele og íslendingar sóu skriftina á vegginum fyri eini 5 árum síðani, í 2003, og tað hevði við sær, at FarIce kaðalin gjørdist veruleiki í 2004. Føroya Tele eigur 20 prosent í FarIce, meðan íslendingar eiga 80 prosent. Men longu tá boðaði Føroya Tele frá, at ein nýggjur kaðal fór at verða lagdur í 2009, og nú, eitt ár áðrenn, er hesin kaðal vorðin veruleiki, nevniliga SheFa, sum dóttirfelagið hjá Føroya Tele, SheFa, eigur at kalla einsamalt.

- Fyri at tryggja støðugt samband er neyðugt við tveimum kaðalum, og tað hava vit nú við SheFa og FarIce, sigur Páll H. Vesturbú, stjóri í SheFa, dóttirfelag hjá Føroya Tele.

Higartil hevur Cantat verið "back-up" hjá FarIce, tað vil siga verið til at taka, um neyðugt var at gera ábøtur á FarIce. Men sum Kristian Davidsen sigur, so var Cantat ikki nøktandi longur til hetta endamálið.

Men føroyski samskiftisveitarin í stóran mun hevur noyðst at dúva upp á útgerð hjá øðrum, Cantat og FarIce, so hevur Føroya Tele í dag ognað sær sín egn kaðal.

Íløgan hjá Føroya Tele í SheFa er 120 mió. krónur, men hartil koma aðrar 100 mió. krónur, sum útlendskt feløg, eitt nú oljufeløg, koma at gera afturfyri at fáa atgongd til kaðalin. Samlaða íløgan gerst sostatt 220 mió. krónur, tá av tornar.

- Í framtíðini verður SheFa høvuðssambandi, vit eiga hendan kaðalin, sigur Páll H. Vesturbú.

## Tænastur til frálandavinnuna

Eitt av kjarnuokjunum hjá Foroya Tele í framtíðini verður at veita tanastur til frálandavinnuna. Nógvir boripallar eru á farleiðini, har SheFa gongur, og tað skapar moguleikar fyri at knýta upp í kaðalin við sonevndum útgreiningum. Saman við oljufelogum sar Foroya Tele framtíðar moguleikar í hesum, eftirsum tørvurin á at flyta stórar dátumongdir okist dag um dag, eisini frá boripallum.

- Vit hava sjálvsagt tikið atlit fyri hesum torvinum, sigur Páll H. Vesturbú og leggur afturat, at atlit eru tikin baði fyri verandi tørvi og framtíðar torvi.

Føroya Tele leggur dent á at veita lyklaklárar loysnir til eitt nú oljufeløgini, so at tey fáa júst tað, teimum tørvar.

- Kundin kann gera avtalu við okkum um til dømis breiðband-samband til ein boripall, so áliggur tað okkum at orðna restina. Kundin nýtist ikki hugsa um meira, tað er tað vit kalla lyklaklárar loysnir, sigur Kristian Davidsen.

Eisini er kaðalin soleiðis gjørdur, at hann er framtíðartryggjaður, tá tað kemur til háferðar samband (high-speed).

- Tørvurin til ferð og kapasitet er nøktaður fleiri ár fram í tíðina, vit síggja ikki beinleiðis avmarkingar fyri okkum. Um neyðugt verður at útbyggja, so kann útgerð setast upp á kaðalstøðum, meðan kaðalin sjálvur kann fáa frið. Sjálvandi er ringt at spáa um framtíðina, ein veit ikki við vissu, hvat tørvur verður á. Men sum nú sar út, so kunnu FarIce og SheFa nokta tørvin eini 5-10 ár fram. Eg kann leggja afturat, at tekniska livitíðin er eini 15-20 ár, sigur Páll H. Vesturbú.



Kaðalin fyllilr lítið